Hoyvíkar Skúli

# STØRV Í HOYVÍKAR SKÚLA

**Søkt verður eftir tveimum lærarum og einum námsfrøðingi.**

**Lærarastørvini:**
Annað starvið er fulla tíð og hitt er umleið 18 tímar. Endaliga tímatalið verður avgjørt í september. Bæði størvini eru tíðaravmarkað fyri lærarar við lækkaðum tímatali og vegna serligan tørv.

**Lærugreinar og flokkar:**
1. flokkur: føroyskt, heimstaðarlæra, handaverk og list.
5. flokkur: kristni og føroyskt.
6. flokkur: enskt.
7. flokkur: kristni og rokning.
Nakrir stuðulstímar.
Umsøkjarar eiga at hava læraraútbúgving. Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Stuðulsstarvið:**
Vit søkja eftir námsfrøðingi at stuðla næmingi í 3. flokki. Starvið er 27 tímar. Løn sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi seinast mánadagin 16. juli.

Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran, Birgit Arge á telefon 227603.

**Hoyvíkar Skúli**
Vegurin Langi
Postsmoga 3073
110 Tórshavn

Í Hoyvíkar Skúla verða komandi skúlaár umleið 500 næmingar í 22 flokkum frá 1.-7. flokk. Her fara at starvast 39 lærarar og 3 stuðlar.

# SUMMARFRÍ

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd frá 16. juli. Opið verður aftur 6. august.

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TORMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

## Lærarastarv í Miðvágs-Sandavágs skúla

Søkt verður eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv 22 t/v skúlaárið 2007/2008 *at lesa stuðulstímar og avlopstímar komandi skúlaár.*

Søkt verður eftir lærara, sum
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við starvsfelagarnar í skúlanum kann undirvísa og taka lut í dagliga virksemi skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- er fúsur at taka við avbjóðingum og broytingum, sum kunnu menna og skapa virðing fyri skúlanum
- seta ein heiður í at vera stundisligur og nærlagdur og halda fast um stavnhaldið, at ***í okkara skúla skulu øll kenna seg væl og trívast.***

Umsøkjarin skal helst kunna átaka sær at undirvísa

| | |
|---|---|
| • næmingi í 6. flokki við serligum tørvi | 10 t/v |
| • 4. flokki í træsmíð | 2 t/v |
| • 3. flokki í donskum | 3 t/v |
| • 9. flokki í søgu | 4 t/v |
| • 3. og 4. flokki stuðul í svimjing | 3 t/v |

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í **lønarflokkunum 18.1-27.4.**

Umsóknir við avriti av prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu verða skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 16. juli 2006 kl. 16.**

Nærri fæst at vita við at skriva, ringja ella koma á tal við Hans Jørgensen, skúlastjóra, Heiðavegur 7, 370 Miðvágur. Telefon 33 28 20 – 33 23 18 ella 21 88 20. Teldupostur mss@skulin.fo.

*Miðvágs-Sandavágs skúli húsast í løtuni í trimum skúlabygningum. Fyrsti flokkur í gamla skúlanum í Sandavági, annar, triði og fjórði flokkarnir í skúlanum í Miðvági og fimti – tíggjundi flokkarnir í meginskúlanum á Giljanesi.*
*Skúlabygnaðurin og bygningarnir hava umfatandi nútímansgerð fyri neyðini. Nýtt skitsuprojekt er gjørt til nýggjan skúla, og leiðslan og lærarahópurin vóna, at ferð nú kemur á.*
*Í skúlaverkinum verða 255 næmingar í 14 flokkum komandi skúlaár. Lærаratalið verður uml. 25.*
*Áhugað kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni www.skulin.fo/mss*

Vit selja nýggja bátar í ymiskum støddum og sløgum m.a. hendan



ring og hoyr nærri, eisini um aðrar møguleikar

**HP.MARINE - SP/F RÚNAR**
Túnagøta 1 • 600 Saltangará
tlf. 219450 • Fax 449191 • hpe@kallnet.fo

**Dagrøktari**
**til Leirvíkar kommunu**

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir dagrøktara, at byrja tann 20.august 2007.

Vit ynskja, at tú
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri.
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum.
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni.
- Ert tolin og vísir umsorgan.
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Í dagrøktarskipanini starvast 11 dagrøktara, ein námsfrøðingur í spælistovuni og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 47.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktararnir ísenn við børnunum í fimleikarhøllini.

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 - 17.15. Lønin er sambært sáttmála við FA.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443251 ella á 743251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøktarleiðara.

Leirvíkar Kommuna tilskilir sær rættin til at lýsa starvið av nýggjum um ov fáir umsøkjara eru.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19.juli 2007.

Vinarliga send umsókn tygara til.

**Leirvíkar Kommunu**
**Dagrøktarskipanin**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

# Maskinstjóri

Søkt verur eftir avloysara sum maskinstjóri til flakatrolaran M/tr POLONUS (gamli Akraberg)

Høvusmotorur WÄRTSILA 4585 HK

Fyri rætta persónin verður sera góð løn givin.

Møguleiki er eisini fyri føstum starvi.

**Tlf.: +3546609147 Jóhannes**
**E-mail: joivarda@simnet.is**

**Toll- og Skattstova Føroya**

## Broyttar upplatingartíðir

Broyttar upplatingartíðir hjá Toll- og Skattstovu Føroya í summar

Frá viku 28 til og við viku 32 er avgreiðslutíðin frá kl. 10 – 14, somuleiðis er telefonavgreiðsla eisini frá 10-14.

Tolleftirlitið svarar sum vanligt.